Búskapur og vinna:

## Nóg nógv olja og gass

Ein útrokning hjá norsku stjórnini vísir, at Noreg hevur nóg mikið av olju eftir í undirgrundini til tey næstu 50 árini, og at nóg mikið av gassi er eftir til tey næstu hundrað árini.

Samstundis hevur Einar Steensnæs, orkumálaráðharri boðað frá, at stjórnin fer at leggja eina ætlan, sum skal vísa, hvørjar avleiðingar oljuframleiðsla við Lofoten og í Barentshavinum kann fáa. Talan er um framleiðslu alt árið. Ráðharrin sigur, at stjórnin fer at seta strong umhvørviskrøv, sum skulu tryggja, at oljuvinna og fiskivinna kunnu virka á somu leiðum.

## Bush hartar vinnuna

Amerikanski forsetin, George W. Bush, hartaði leygardagin amerikanskar fyritøkur, sum í seinastuni eru avdúkaðar fyri brot á roknskaparreglur og onnur ólóglig viðurskifti. Forsetin segði, at landsmyndugleikarnir fara at rættarsøkja teimum fyritøkum, sum villleiða íleggjarar og starvsfólk.

Fyri einari viku síðani varð avdúkað, at telefyritøkan World Comn hevði bókað 30 milliardir krónur í inntøkum, sum als ikki vóru til, og fríggjadagin kom fram, at kopifyritøkan Xerox hevði bókað 14 milliardir krónur ov nógv í inntøkum.

Bæði republikanararnir og demokratarnir í Kongressini krevja nú, at stig verða tikin til at revsa teir, sum hava ábyrgdina av svikinum.

## Bill seldi

Sambært amerikanska fíggjareftirlitinum SEC hevur Bill Gates selt átta milliónir partabrøv í Microsoft í seinastuni. Sambært eftirlitinum fekk hann 400 milliónir dollarar burtur úr søluni. Bill Gates eigur 12 prosent av partapenginum í Microsoft, sum seinastu tíðina er fallið meiri enn 20 prosent í virði.

UTTAN ÚR HEIMI

# Funnu bræv frá bin Laden

**Amerikanska fregnartænastan sigur, at yvirgangsleiðarin Osama bin Laden slapp livandi frá amerikansku bumbuálopunum á holurnar har eysturi í Afghanistan**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*


*CIA avdúkar nú, at Osama bin Laden slapp livandi frá amerikansku bumbuálopunum á holurnar har eysturi í Afghanistan*

*Mynd: Reuters*

Keldur í amerikansku fregnartænastuni CIA søgdu fyri blaðnum Time í gjár, at amerikansku myndugleikarnir hava fingið váttan fyri, at yvirgangsleiðarin Osama bin Laden var á lívi í desember, og at hann sostatt slapp undan teimum ógvusligu amerikansku bumbuálopunum har eysturi í Afghanistan á lívi.

Amerikansk flogfør bumbaðu holurnar í Tora Bora í fleiri dagar, tí illgruni var um, at bin Laden fjaldi seg har.

Keldurnar í CIA siga, at tá pakistanska løgreglan handtók Abu Zubaydah fyri trimum mánaðum síðani, hevði hann eitt bræv frá bin Laden uppiá sær. Brævið var dagfest í desember, og sambært CIA er eingin ivi um, at tað er bin Laden, sum hevur skrivað brævið, og at dagfestingin er bein. Tað merkir sostatt, at bin Laden slapp úr Tora Bora á lívi, um hann yvirhøvur var har.

Abu Zubaydah varð tikin í pakistanska býnum Faisalabad í mars, og sambært CIA avdúkar brævið eisini, at ein sonur bin Laden, Saad, var í Faisalabad í desember.

Abu Zubaydah verður mettur at vera ein av næstu monnum bin Ladens. Hann er nú í varðhaldi hjá amerikansku myndugleikunum.

# Metstórt endurgjald eftir flogvanlukku

**Avvarandi hjá teimum, sum doyðu í flogvanlukkuni í Linate-floghavnini í fjør, kunnu vænta sær metstórt endurgjald**

LINATE-VANLUKKAN
*Árni Joensen*

Nógv bendir á, at avvarandi hjá teimum 118, sum doyðu í flogvanlukkuni í Linate-floghavnini í Milano síðsta heyst, kunnu vænta sær metstórt endurgjald.

- Eg dugi ikki rættiliga at siga, hvar vit enda, men talan er í hvussu er upphæddir, sum eru langt oman fyri tað, sum vit eru von við í Norðurlondum, sigur svenski sakførarin Stephan Eriksson. Saman við øðrum sakførarum umboðar hann tey avvarandi hjá 42 fólkum, sum doyðu í vanlukkuni í Linate. Í arbeiðinum hava sakførararnir havt samband við kenda amerikanska sakføraravirkið Podhurst, ið verður roknað millum tey fremstu, tá talan er um endurgjaldskrøv av hesum slagnum.

Høvuðsendurgjaldskravið verður lagt ímóti amerikansku flogverksmiðjuni Cessna, tí eitt lítið flogfar av hesum slagnum kom út á breytina, sum eitt flofar hjá SAS kom eftir. Av tíat Cessna er amerikanskt, verður tann parturin av endurgjaldskravinum reistur í USA. Podhursat hevur áður havteitt endurgjaldskrav ímóti Cessna eftir eina vanlulkku í Florida, sum kostaði 110 mannalív. Ta ferðina eydnaðist tað at fáa flogverksmiðjuna at rinda teimum avvarandi næstan tvær milliardir krónur.

Stephan Eriksson, sakførari vil ikki siga, hvussu stórt endurgjald teir fara at krevja frá Cessna, men sambært svenska Svenska Dagbladet er talan um 2,5 milliardir krónur.

Endurgjaldskravið ímóti Cessna er bert eitt av fleiri, tí krøv verða eisini løgd ímóti italsku loftferðslumyndugleikunum, eftirlitinum í Linate-floghavnini, týska felagnum, sum átti Cessna-flogfarið og ímóti SAS. Stephan Eriksson sigur, at tað verður kortini Cessna, sum skal rinda nógv tann størsta partin av endurgjaldinum, kanska millum 60 og 80 prosent.

Higartil hava avvarandi hjá teimum 118, sum doyðu, fingið góðar 200.000 krónur frá SAS, 30.000 krónur frá landspartamyndugleikunum í Lombardia og 90.000 krónur frá býráðnum í Milano.

Úr Norðurlondum:

## Heidningabrúdleyp

Fyri fyrstu ferð síðani Ólavur tann Heilagi kristnaði norðmenn, hevur eitt sokallað heidningabrúdleyp verið í Noregi.

Tað hendi nú eina náttina, tá ein maður og ein kvinna úr Ný Sælandi svóru hvør øðrum trúareið í Bygdøy í Oslo. At tey valdu at fara allan vegin til Noregs komst av, at tað eru bara Noreg og Ísland, sum viðurkenna heiðin trúarsamfeløg.

Nýsælendsku hjúnini er limir í einum heidnum trúarsamfelag, sum hevur 90 limir.

## 11% høvdu útlendskan uppruna

Hagtøl hjá donsku myndugleikunum vísa, at 11,1 prosent av børnunum, sum vórðu fødd í Danmark í fjør, høvdu foreldur, sum vóru av útlendskum uppruna.

Tølini vísa eisini, at í summum kommunum eru munandi fleiri børn av útlendskum uppruna. Eitt nú vóru 26,1 prosent av nýføðingunum í Keypmannahavn av útlendskum uppruna, í Brøndby høvdu 36 prosent útlendsk foreldur og í Albertslund heili 39 prosent.

Landsmyndugleikarnir biðja nú kommunurnar fyrireika skúlarnar betur til at taka ímóti einum veksandi tali av børnum av fremmandum uppruna.

## Koyrdir til lands

Norska skipaeftirlitið var eirindaleyst, tá tað nú um dagarnar sendi fólk umborð á nakrar stuttleikabátar í Oslofjørðinum. Tað vísti seg, at trygdarviðurskiftini umborð á fleiri bátum vóru ikki í lagi, og fimm bátaeigarar fingu boð um at fara til bryggu við bátunum.

Skipaeftirlitið gjørdi eisini trygdarkanningar umborð á stuttleikabátum í Oslofjørðinum í fjør. Tá skrásetti eftirlitið ikki færri enn 461 brot á ymsar trygdarreglur.



# Brandur verður nógv spældur á Pop TV


*Brandur Enni er væl umtóktur í Íslandi*

**Íslendska alternativið til MTV tráðspælir sangin Waiting in the Moonlight hjá Brandi Enni, og tað er áhugi at fáa føroyska sangaran aftur til Íslands at spæla**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Ferðin hjá Brandi Enni til Íslands miðskeiðis í hesum mánaði setti rættiliga ferð á umrøðuna av honum. Íslendska Pop TV hevði millum annað vitjan av tvøráimanninum, og síðani hevur sangurin Waiting in the Moonlight verið nógv spældur á rásini.

Í nýggjastu útgávuni av litblaðnum Séð & Heyrt (svarar til danska Se & Hør) eru tvær síður, sum snúgva seg um, hvussu væl dámdur Brandur var millum genturnar, tá hann sang á íslendska tjóðardegnum.

Áhugi er eisini fyri at fáa Brand aftur til Íslands at spæla í næstum, men enn er tað ikki greitt, nær og hvar hetta verður.

Fyrsta uppgávan hjá Brandi verður at syngja tveir nýggjar sangir inn til eina stakfløgu, sum skal koma út fyri ólavsøku.

# Clickhaze á toppinum

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Clickhaze staðfestir sína støðu sum helst best umtókti bólkurin í Føroyum í løtuni við at vera nummar 1 á 15 teimum bestu.

Sangurin Daylight streyk leygarkvøldið upp á ovastu rók á 15 teimum bestu.

Eftir at Brandur hevur verið einasti kappingarneytin til útlendsku hittini, stakk eysturoyarbólkurin seg fram um allar hinar.

Sangurin Daylight er ein av nýggju sangunum, sum eru at finna á EP-fløguni, sum bólkurin gav út fyri stuttum. Sølan av hesi fløgu hevur gingið strúkandi, tí hóast bara tvær vikur eru, síðani hon varð givin út, eru eini 1600 eintøk seld. Tað er nógv meira, enn bólkurin hevði roknað við frammanundan.

Brandur Enni fekk ein nýggjan sang inn á listan. Tað er sangurin Be my Girl, sum kom beinleiðis inn sum nummar 12. Brandur hevur sostatt tveir sangir á listanum í løtuni, tí Waiting in the Moonlight, sum hevur verið nummar 1, er framvegis at finna á listanum.




**Stórur brúktbilamarknaður**



**Mazda 323 C 1,5i LX**
bláur, 3 hurðar, 5 gear, árg. 03/97, km 72.000
**89.000,-**


**Seat Cordoba**
gráur, 4 hurðar, 5 gear, árg. 07/96, km 82.000
**75.000,-**



**Mazda 323 S 1,5i LX**
reyður, 4 hurðar, 5 gear, árg. 11/98, km 57.000
**96.000,-**



**Renault Megane 1,6e**
reyður, 5 hurðar, 5 gear, árg. 12/96, km 70.000
**80.000,-**



**Mazda 323 S 1,5i LX**
reyður, 4 hurðar, 5 gear, árg. 05/97, km 69.000
**78.000,-**



**Toyota Corolla 1,3 Galla**
grønur, 4 hurðar, 5 gear, árg. 07/95, km 69.000
**79.000,-**



**Mazda 323 S 1,5i LX**
gráur, 4 hurðar, 5 gear, árg. 08/97, km 61.000
**82.000,-**


**Toyota Hi-Lux PickUp Diesel**
bláur, 2 hurðar, 5 gear, árg. 12/94, km 122.000
**90.000,-**



**Mazda 626 S 1,8i LX**
grønur, 4 hurðar, 5 gear, árg. 05/96, km 151.000
**75.000,-**


**Mazda E2200 PickUp trælast**
reyður, 2 hurðar, 5 gear, árg. 05/97, km 79.000
**74.000,-**



**Ford Escort 1,8 TD St. car**
reyður, 5 hurðar, 5 gear, árg. 08/97, km 50.000
**110.000,-**


**Mazda E2200 PanelVan**
gráur, 5 hurðar, 5 gear, árg. 01/98, km 74.000
**74.000,-**



**Ford Escort 1,8 Diesel Sedan**
svartur, 4 hurðar, 5 gear, árg. 08/95, km 146.000
**76.000,-**


**Mazda B2500 PlusCab SDX 4x4**
bláur, 2 hurðar, 5 gear, árg. 02/00, km 35.000
**140.000,-**

**BERG MOTORS**
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35